# Lærupláss hjá Rasmussen & Weihe

Hevur tú nýliga tikið ella tekur tú students-, HF- ella HH-prógv í summar, og ert tú áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving, er neyvan betri møguleiki enn eitt lærupláss hjá Rasmussen & Weihe.

Rasmussen & Weihe er ikki eitt vanligt grannskoðaravirki, tí hugsað verður ikki einans um roknskap og tílíkt. Vit eru 30 eldhugað starvsfólk, ið starvast saman í einum sera góðum arbeiðsumhvørvi. Eitt av aðalmálum okkara er, at øll starvsfólk trívast, bæði tá ið tey eru til arbeiðis, og tá ið tey hava frí.

Starvsfólkini hjá okkum skulu vera á høgum fakligum støði. Tí er ein útbúgvingarskipan løgd til rættis, og vit stuðla tær sjálvsagt so nógv sum gjørligt í tíni fakligu og persónligu menning. Frá okkara síðu er tað beinleiðis ein treyt, at tú ert sinnað(ur) at lesa HD. Ætlar tú tær síðani víðari, kanst tú til dømis lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi og harvið fáa eina hægri útbúgving, samstundis sum tú vinnur pening. Tað er sjálvandi eisini møguligt at lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark - tú kanst fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá fremstu grannskoðarafyritøku í Danmark: PricewaterhouseCoopers.

Grannskoðan var fyrr mangan hildið at vera eitt keðiligt arbeiði, har ein bara sat og stardi at tølum. Í dag er veruleikan tann, at grannskoðarin ofta virkar sum ráðgevi, og við sínum heildarinnliti í viðurskifti kundans er hann eisini førur fyri at veita virðisskapandi ráðgeving.

Jú, grannskoðan er í roynd og veru spennandi, og ein útbúgving hjá okkum gevur sera góðar framtíðarmøguleikar.

Vit rokna við, at tú skalt byrja 1. september, men vit kunnu gera eina setunaravtalu longu áðrenn vit fara í summarfrí 1. juli. Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juni 2003.

Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole G. Nielsen ella Klaus Rasmussen.




*Lærupláss á vinnandi liðnum?*
*Rasmussen & Weihe - vinnari av Føroya Bjór Cup 2003*

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Sosialurin 341800

# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**
1) – at stuðla og hjálpa einum 12 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur og fara við honum til frítíðarítriv, aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatalið er **10 tímar um vikuna**.
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

**Sandoy**
2) – at stuðla einum 3 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum spæli og fara við honum til viðgerð.
Tímatalið er **30 tímar um vikuna**. Arbeiðið verður gjørt í heiminum hjá barninum og í dagrøktini.
Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur kunnleika til børn við serligum tørvi.
Neyðugt er at tann ið settur verður hevur koyrikort.
Játtanin er fyribils galdandi 30.06.04

**Norðoyggjar**
3) – stuðulsfólki til 7 ára gamlan fjølbrekaðan drong, **5 tímar um vikuna**.
Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna. Arbeiðstíðin er skiftandi seinnapartar – kvøld og vikuskifti.
Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

4) – stuðulsfólki til 13 ára gamla rørslutarnaða gentu, **10 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir um at gera venjingar við gentuni og fara við henni til viðgerð.
Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá gentuni.
Neyðugt er at tann ið settur verður hevur koyrikort.
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkal 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 16.06.2003.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

**A.** Navn: P/F Krossbrekka (P/F-nr. 2039), 513 Syðrugøta.

og
**B.** Navn: P/F Miðalberg (P/F-nr. 2520), 510 Gøta.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

*Skráseting Føroya tann 28. mai 2003*

*Kristin Balle*

**veitst tú ikki tað? Sosialurin**

FA. GRAVSTEINAR




Opi¶: m nadag - fr ggjadag 9 00 -17 00
annars samb rt avtalu.

V¿ruskr kann f ast!

Sj nband - 31 77 74






Ring 318445 ella 216980 og hoyr nærri...

Betur fært tú tað ikki...
Salong Viviann
**Salong Viviann** • Niels Finsens gøta 36 • 100 Tórshavn

Sjúklingahotellið Tórshavn

# Skrivstovufólk

Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn søkir við hesum eftir einum skrivstovufólki at arbeiða 25 tímar um vikuna.

Starvið umfatar umsiting av bókhaldinum, gerð av lønum og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar skulu hava kunnleika til bókføring, umsiting av rokniskapi og góðan telduførleika.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir Familju- og heilsumálaráðnum.
Á Sjúklingahotellinum kunnu sjúklingar, ið søkja sær viðgerð og heilsubót á sjúkrahúsum í Keypmannahavn, saman við avvarðandi hava eitt tilhald.

Sjúklingahotellið hevur pláss fyri umleið 70 fólkum og starvast her 18 starvsfólk.

Starvið er leyst at seta 1. juli ella eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Inu Frisdahl, leiðara telefon 0045 77 33 64 64 ella fartelefon 00 45 21 67 72 90.

Umsóknir skulu sendast til:

**Sjúklingahotellið Tórshavn**
Tåsingegade 29 5. sal
2100 København Ø
mrk. umsøkn

ella við telduposti if-torshavn@get2net.dk

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10/6 2003 klokkan 14.00.

**Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir**

# pedagogi

Starvið í vøggustovuni, ið er normerað til 35-40 tímar um vikuna, ynskist sett fyrst í august mánað.

***Vit ynskja:***
- At tú hevur áræði at skapa ein tryggan dag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.
- At tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi.
- At tú luttekur í arbeiðinum við at skapa tann nýggja stovnin, ið verður bygdur í næstum.

***Vit bjóða:***
Eitt livandi arbeiðspláss, við 7 eldhugaðum starvsfeløgum, harav 2 eru pedagogar. Haraftrat bjóða vit eitt pláss til títt egna barn í vøggustovuni ella í barnagarðinum.

***Umsókn:***
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í senasta lagi 15 juni.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Honnu Jacobsen leiðara ella Elsu Jacobsen, varaleiðara tel 328121

team85 • 358000

**KIRKJUBØAR KOMMUNA**

# Hús á Tvøroyri



Hús á Tvørabakka til sølu um hóskandi boð fæst. Tey eru í sera góðum standi. Stødd 106 fermetrar við kjallara. Grundøkið 550 fermetrar. Barnavinarligt umhvørvi.

**Tlf. 3371313 ella 213713**

# Frá Haldórsvíkar Avhaldsfelag

Eydnuhjólið sum skuldi verða 9. juni (2. hvítusunnudag) er útsett til sunnudagin 7. sept. 2003.

**Nevndin**



# Dámar tær væl make-up...?

Og droymir tú um eitt starv har tú kanst læra alt innan húðrøkt? So er hetta kanska nakað fyri teg, tí The Body Shop í SMS søkir eftir lærlingi.

Vit vænta at tú ert smílandi, ágrýtin og álítandi og at tú dugir at samstarva við onnur fólk. Somuleiðis skalt tú kunna laga teg eftir arbeiðsuppgávunum, tá nógv stendur á.

Hevur tú FHS ella HH-prógv, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn saman við prógvum til okkara innan 10. juni 2003.

Umsóknin skal sendast til:

The Body Shop
Postboks 1126
110 Tórshavn



THE BODY SHOP
SMS • 31 95 05



fríggjakvøldið 30/05
**Discoteque**
v/Ottar í Funningsstovu
Konufólk ÓKEYPIS atgongd áðrenn kl. 01.00

leygarkvøldið 31/05
**Discoteque**
v/Tummas Gudmundsen
opið frá kl 23.00 - 04.00

TILBOÐ: sí www.platform.fo
PLATFORM discoteque

sí www.platform.fo

petur & petur • 320870

# Avlýsing
## frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Vegna verkfall verða Skómakari og bandagistur frá SAHVA **ikki** á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 3.-4. juni og á Landssjúkrahúsinum 5. juni.